## Felagið Vágar hevur búmerkjakapping



*Vágar er vøkur og stórbær oyggj, sum hevur nógv at bjóða*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Felagið Vágar skal hava búmerki, sum kann gera felagið sjónligari í gerandisdegnum. Kapping er skrivað út, og bara hugflogið setir mørkini**

BÚMERKJAKAPPING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Fyri at gera Felagið Vágar meira sjónligt, er gjørt av at skriva út ein búmerkjakapping, greiðir Terji Nielsen, dagligur leiðari hjá Felagnum Vágum frá.

Felagið Vágar varð stovnað í vetur, tá Vága Vinnufelag og Ferðavinnan í Vágum vórðu løgd saman í eitt felag. Felagið rekur Kunningarstovuna í Vágum umframt kuningardiskin á flogvøllinum. Trý fólk stavast í dag hjá Felagnum Vágum.

Endamálið hjá felagnum er millum annað at menna bæði ferðavinnu, handilsvinnu og aðra vinnun í Vágum umframt at skipa fyri handilsvinnu- og mentanartiltøkum í oynni.

Terji Nielsen, kunningarleiðari, sigur, at endamálið við búmerkjakappingini er at fáa eitt búmerki, sum kann nýtast í ymsum tiltøkum hjá Felagnum Vágum.

Handlar og fyritøkur, sum eru limir í felangum, fara at hava merkið á ásýniligum støðum, soleiðis at gjølla sæst, at tey eru við í felagnum.

Eisini í øðrum samanhangi, har Felagið Vágar ella limir tess eru við, er tað av týdningi, at nýta búmerkið og gera vart við, at tey eru í felagnum.

Búmerkjakappingin er sett til at vera fram til 15. juni, tá uppskotini skulu vera Felagnum Vágum í hendi.

Eingi krøv eru sett til búmerkið, sigur Terji Nielsen. Men tey vænta kortini, at tey fara at halda seg til eit einfalt og eygagott búmerki, sum fólk leggja merki til. Í aðrar mátar er bara hugflogið, sum setir mørk.

Tey hava fingið professionelt fólk at hjálpa sær við at døma innkomnu uppskotini. Har eru fólk frá lýsingarfyritøkum og Ferðaráðnum, eins og eisini tvey fólk frá Felagnum Vágum eru við.

At Ferðaráðið er við í dómsnevndini kemst av, at stórur partur av virkseminum hjá Felagnum Vágum júst hevur tilknýti til ferðavinnuna so ella so, sigur Terji Nielsen.

Uppskot til búmerkjakappingina hjá Felagnum Vágum skulu sendast til Felagið Vágar, 370 Miðvági, og skulu vera inni í seinasta lagi tann 15. juni 2003.

Vinnarin av búmerkjakappingini fær ein APEX ferðaseðil fyri tvey til Danmarkar við Atlantsflog. Nummar tvey fær eitt vikuskifti fyri tvey á Hotel Vágum við morgunmati og døgurða, sigur Terji Nielsen.

# Ferðafólkini fjølgast í Føroyum

**Føroyska ferðavinnan letur hampiliga væl at útlitunum hjá vinnuni. Árið í fjør royndist rímiligt, og útlitini í ár eru ikki verri, verur sagt frá vinnuni**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Tað er í fyrsta lagi føroysku náttúruna, fremmand ferðafólk koma at síggja. Men eisini føroyingar hava frálíkar upplivingar tilgóðar, um farið verður á fjøllini. Eitt nú frálíka útsýnið oman yvir Víkar í Vágum við Ritunøvini, Nýggjabergi og Reipsáfossi í baksýni*
*Mynd: Edvard Joensen*

Ferðavinnan er í menning, og føroyingar hava hug at ferðast í Føroyum. Tey hava gott mót á Feðraráðnum, sum her fyri hevði framsýning á Torginum í SMS, har endamálið var at fáa føroyingar at ferðast meira í Føroyum.

– Tað er ilt at siga, um átakið hevði nakra beinleiðis ávirkan á, at føroyingar ferðast meira her heima heldur enn at fara uttanlands, sigur Birita Nolsø á Feðraráði Føroya. Men áhugin var avgjørt har, og nógv fólk kom framvið og spurdi og tók faldarar við sær. So vóna vit bara, at tey eisini hyggja í hann og fara ein túr her á landi, sigur hon.

Hon sigur, at fólk løgdu veruliga merki til átakið, og at tað var nógv fólk, sum vísti áhuga. Onkur var eisini, sum nevndi, at tey áttu at gjørt meira burtur úr at ferðast í Føroyum, enn higartil hevur verið gjørt.

Birita Nolsø sigur, at tiltakið í SMS kanska eisini vakti áhuga millum fólk, tí tað nú er nakað fráliðið, síðan Ferðaráðið hevði nakað líknandi tiltak.

Hvussu tað stendur til við føroyskum feðrafólkum í Føroyum, er verri at siga, heldur hon. Hagtølini eru ikki so øgiliga góð, hóast onkur eru.

Hon nevnir eitt nú túrarnar hjá Rasmusi Skorheim á Selatrað, og túrarnar undir Vestmannabjørgini, har hagtøl verða skrivað. Har vísir tað seg, at væl av føroyingum eru við.

– Tað er eitt sindur ymiskt, sum tað frættist frá, vísir Birita Nolsø á. Men tað tykist, sum eru tað summi støð, har føroyingar mestsum eru í meiriluta.

Birita Nolsø greiðir frá, at tað serliga eru kunningarstovurnar í Eysturoynni, sum hava hgtøl at vísa til, og tey eru ikki so galin. Gistingarhús, matstovur og kunnignarstovurnar sjálvar siga frá fleiri vitjandi í fjør enn í fyrrárið.

Serliga vallaraheimini í Eysturoynni hava merkt vøkstur, vísa hagtølini. Gjáargaður heili 50 prosent, og sum heild eini 40 prosent í meðal.

Matstovurnar láta eisini væl at, og útleigan av frítíðarhúsum og íbúðum gongur væl. Eisini handlar, sum eitt nú selja føroyskar ullvørur, siga frá vaksandi sølu.

Ferðafólkini koma spjadd ymsastaðni frá. Tó er størsti bólkurin danir. Síðan koma aðrir skandinavar, og so bretar og týskarar. Suðureuropearar og amerikanarar síggjast eisini aftur í hagtølunum.

Ymist er, sum fólk vilja síggja og spyrja eftir. Amerikanarar vilja helst keypa meira enn onnur fremmand ferðafólk. Men eingin ivi er um, at tað er føroyska náttúran, sum ferðafólkini taka til sín.

Tað týðir upp á framdrift í ferðavinnuni, sigur Birita Nolsø. Á Ferðaráðnum hava tey góðar vónir um framgongd í føroysku ferðavinnuni, sum vónandi fer at menna seg til eitt rættiligt íkast í búskapinum.

## Konsert við Bíggjarkórinum

**Sunnukvøldið fer Bíggjarkórið at hava fjølbroytta konsert í Sørvágs Kirkju**

KONSERT

Bíggjarkórið fer sunnukvøldið at hava konsert í Sørvágs kirkju. Konsertin verður klokkan 20.00 sigur kórleiðarin, Ólavur Hátún.

Skráin verður fjølbroytt, greiðir Ólavur frá. Føroyskir sálmar og sangir, eins og norðurlendskir sangir eisini vera á skránni.

Men farið verður longri enn so, sigur hann. Europeiski kórtónleikurin er ríkur, og haðani verður okkurt eisini at hoyra, eins og onkur Negro Spiritual ivaleyst eisini verður við.

Í Bíggjarkórinum eru einir 20-25 sangarar, sum flest allir hava eitthvørt tilknýti til Bíggjar. Ikki øll búgva í dag í Bø, sigur kórleiðarin, men ættarbondini eru tann vegin.

**ej**



*Hóast Bøur er fáment bygd, er eitt vælmannað kór í bygdini*



*Ovasti myndugleikin fyri lóg og landaskili í Føroyum sigur, at løgreglan bar seg rætt at, tá ið hon undir verkfallinum í 2001 avgjørdi at upploysa allar blokadur, sum arbeiðarafeløgini høvdu sett í verk*

# Blokadurnar hjá arbeiðarafeløgunum ólógligar

**Danska løgmálaráðið sigur í svari upp á kæru frá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, at løgreglan fór rætt fram, tá hon undir verkfallinum í 2001 avgjørdi at upploysa allar blokadur kring landið, tí vandi var fyri samanbresti millum privatfólk og verkfalsvaktir.**
**- Væntast kann tí, at løgreglan ber skjótt at, um blokerað verður undir hesum verkfallinum, heldur Vinnuhúsið**

VERKFALL OG BLOKADUR
*Vilmund Jacobsen*

Nú verkfall er, hava fleiri limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag spurt, um arbeiðarafeløgini hava loyvi at steðga ferðsluni og blokera virkir og fyritøkur, soleiðis sum gjørt varð undir verkfallinum í 2001. Ta ferðina kannaðu verkfalsvaktir eitt nú viðførisrúm í privatbilum og avbyrgdu virkir, ið mistu nógvan pening av blokadunum.

Hetta skrivar Vinnuhúsið í grein á heimasíðuni.

Roknað verður ikki við, at arbeiðarafeløgini verða líka so framlig hesaferð, tí nú hava bæði fútin, M. Nepper-Christensen og danska løgmálaráðið, sagt, at hesar blokadur eru ólógligar.

### Feløgini kærdu

Tað vóru Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum kærdu framferðina hjá løgregluni undir verkfallinum í 2001 til fútan.

Í apríl 2002 svaraði M. Nepper-Christensen kæruni hjá feløgunum. Í svarinum metir fútin ikki, at grundarlag er at finnast at arbeiðsháttinum hjá løgregluni undir verkfallinum, tí veruligur ófriður kundi tikið seg upp, um løgreglan ikki legði uppí.

Fútin sigur í svarinum:

"Politiet gav besked om, at de nævnte handlinger skulle ophøre. Der var forsamlet adskillige blokadevagter de omhandlede steder, og der forelå oplysninger om, at trafikanter blev udsat for blokader, ransagninger og anden usømmelig behandling, således at der var forstyrrelse af færdslen flere steder. Mange i befolkningen reagerede kraftigt på blokadevagternes handlinger, hvorfor der var nærliggende risiko for en direkte konfrontation mellem befolkningen og blokadevagterne. Derfor greb politiet ind."

### Kærdu aftur…

Tá arbeiðarafeløgini høvdu fingið hetta svarið frá fútanum, avgjørdu tey at kæra málið víðari til danska løgmálaráðið, og haðani kom svar aftur í februar í ár.

Í svarinum tekur løgmálaráðið undir við øllum tí, sum fútin førir fram og afturvísir kæruni. Í skrivi til Føroya Arbeiðarafelag og H a v n a r Arbeiðskvinnufelag leggur løgmálaráðið aftrat:

"Justitsministeriet kan særligt í relation til retsplejelovens paragraf 108 tilføje, at det efter ministeriets opfattelse ikke har betydning for anvendelsen af denne bestemmelse, at blokaderne alene var rettet mod den erhvervsmæssige trafik."

Vinnuhúsið staðfestir tí, at løgreglan sostatt hevur fullan rætt til at steðga blokadum, ið eru vendar ímóti vinnuligum virksemi.

- Nú ovasti myndugleikin fyri lóg og landaskili hevur váttað hetta, bíðar løgreglan neyvan leingi við at leggja uppí, verður vinnuligt virksemi kring landið blokerað, heldur Vinnuhúsið.

## Stjørna í eitt kvøld á Glyvrum

**Fleiri av næmingunum, sum ganga á tónleikabreytini, fara at royna seg sum sangsolistar, og summir fara á fyrsta sinni at standa á palli og syngja fyri fólki**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*

Í kvøld, 15. mai klokkan 20, fáa næmingarnir, sum ganga á tónleikabreytini í skúlunum í Runavík og á Toftum, høvi at standa á palli fyri almenninginum og kenna seg sum stjørnur í eitt kvøld.

Týskvøldið royndu tey seg fyri innbodnum fyri fullari fimleikahøll, og hóskvøldið klokkan 20 hevur almenningurin høvi at koma at lurta.

- Í longri tíð hevur verið arbeitt við hesum tiltakinum á tónleikabreytini. Næmingarnir hava fyri tað mesta sjálvir valt sær tey løg, ið teir kundu hugsað sær at framført. Tí er úrvalið av løgum rættiliga fjølbroytt, siga tey, sum skipa fyri.

Sum fylgispæl hava næmingarnir eitt sera gott orkestur, ið telur so frægar tónleikarar sum Høgna Lisberg, trummur, John Mortensen, tangentar, Jákup Olsen, bass og Hjalta Joensen, guitar.

Hesir úrvalstónleikarar hava nýtt nógva tíð at fáa kvøldið so gott og professionelt sum til ber.

Fleiri av næmingunum fara at royna seg sum sangsolistar.

Summir standa á fyrsta sinni á palli og syngja fyri fólki. Nógv hevur verið vant - bæði saman við tónleikarum og uttan.

Tað er Jóhan Mortensen, lærari á tónleikabreytini, sum hevur fingið hetta tiltakið í lag.

Eitt ávíst samstarv hevur eisini verið við ein part av miðlabreytini á skúlunum báðum.

Næmingarnir hava gjørt videoupptøkur av stjørnunum, sum skulu vísast í samband við framførsluna.

Tiltakið fyri almenninginum verður sum nevnt í kvøld klokkan 20, og tað verður í fimleikahøllini í skúlanum á Glyvrum..

Atgonumerki fáast við dyrnar og kosta 30 krónur.



*Áhugavert tiltak verður í fimleikarhøllini í Glyvra skúla í kvøld kl. 20. Øll eru vælkomin, og atgongumerki fáast við dyrnar fyri 30 krónur*

## Suni Schwartz á fundi

SEMING OG VERKFALL
*Vilmund Jacobsen*



Sosialurin royndi at fáa fatur á varasemingsmanninum, Suna Schwartz Jacobsen, fyrrapartin í gjár, men tá ið vit hittu hann í telefonini, sat hann á fundi og hevði tískil ikki stundir at gera viðmerkingar til tað, sum arbeiðarafeløgini føra fram í kæruni til Vinnumálaráðið.

Vit fáa væntandi eina viðmerking frá Suna Schwartz Jacobsen til blaðið í morgin.